rev. 29-01-2019 av Sigurð og Elian KBF/BSF

# Leiðreglur fyri FM fyri lið U11, U-13,U-15 og U-17/19

## § 1 liðkapping

- Liðkappingin er skipað við innleiðandi bólkaspæli um talið av tilmeldaðum liðum er oman fyri 5 lið, síðani verður spælt víðari eftir cup-skipan. Er talið 5 ella færri, spæla liðini hvør móti øðrum.
- Vinnari av bólkaspælinm er tað liðið ið eftir at øll umfør eru spæld, hevur flest stig. Sama er galdani fyri liðkappingina um talið av liðum er 5 ella færri

    - Stendur á jøvnum í stigum, er tað liðið hevur vinnið samanlagt flestar dystir (HS, DS, HD, DD og MD)
    - Stendur enn á jøvnum, telja innanhýsis dystir. (HS, DS, HD, DD og MD)
    - Um tað stendur á jøvnum millum 3 lið, so telja poengmunur á øllum settum.

## § 2 Sammanseting av lið

- Eitt lið umfatar 4 upp til 8 leikarar. Minsta mark er 2 dreingir og 2 genta. Max 4 dreingjapláss og 4 gentupláss.
- Tað er ikki loyvt at leika á 2 liðum.
- Tað er ikki loyvt at leika í 2 ymiskum aldursbólkum.
- Um eitt felag ikki megna at gera lið einsamalt, kann BSF loyva feløgum at gera felagslið.

## § 3 Liðleiðari

- Hvørt lið skal hava ein vaksnan liðleiðara, ið hevur ábyrgd av liðinum, hesin verður upplýstur við tilmelding og skal verða 18 ár ella eldri og skal seta seg inn í leiðreglurnar aðrenn kappingina.
- Um hesin ikki sjálvur kann møta til kappingin, hevur hann ábyrd av at senda ein avloysara fyri seg og boða frá til kappingarleiðsluna.
- Feløgini hava ábyrgd av at liðini eru mannaði til kappingarnar, og um ikki tað eydnast, so at geva boð til kappingarleiðslina hjá tí felagnum ið hevur kappingina.

## § 4 Lið-dysturin

- Í lið-dysti verður leikt í HS, DS, HD, DD og MD. (5 dystir)
- Sami leikara hevur í mesta lagi loyvi at spæla 2 dystir í einum liðdysti.
  Allir leikarar skulu spæla minst ein kamp í hvørjum liðdysti.
- Felagið sum skipar fyri kappingini, saman við kappingarleiðsluni, ger av hvussu nógv skal leikast uppí, so at tíðarætlan fyri kappingina kann haldast. Útgangstøði er at spæld verður best av 3 settum uppí 21.
- Allir 5 dystirnir í einum lið-dysti eiga at verða spældir. Um ein leikari far álvarsligan skaða undir kappingini og ikki fær spælt, kann kappingarleiðslan geva undatak, men punkt 2 skal yvirhaldast. Ella verður tann dysturin taptir. T.d HS . Í endaspælinum kunnu liðini semjast um, at enda liðdystin, tá liðdysturin er avgjørdur.
- Tað ber ikki til, at broyta uppstillingina undir einum liðdysti, so um leikari ikki kann spæla, verður dysturin taptir. T.d DS.
- Vunnin lið-dystur gevur 1 stig.

- Taptur lið-dystur gevur 0 stig
- Um felag tekur lið úr kappingini, skal hetta boðast frá til kappingarnevndina beinan vegin.
- Um felag tekur lið úr kappingini eftir at dystir eru leiktir, verða leiktir dystir strikaðir.
- Innan hvønn lið-dyst letur hvørt liðið inn ein dystarseðil í lokaðum brævbjálva, har navnið á leikarunum til einstøku dystirnar er uppskrivað. Kappingarleiðslan letur brævbjálvarnar upp, tá ið báðir eru innkomnir, og skrivar ein felags dystarseðil.

## § 5 Dommari og teljari

- Sum í øðrum kappingum døma leikarnir sjálvir.
- Hinir leikarnir kunnu telja stig, men ikki blandað seg uppí dømingina.
- Um ivamál taka seg upp, sum leikarar saman við Liðleiðarunum  ikki sjálvi megna at loysa, er tað upp til kappingarleiðsluna at finna eina loysn.
- Um lið ynskir dómara, skipar kappingarleiðslan fyri døming

## Kappingin:

- Kostnaðurin er 300,- fyri hvørt lið, og verður goldið fyriskipandi felagnum.
- Fyriskipandi felagið far allar inntøkur og ber allar útreiðslur av kappingini, og tekur sær av tí praktiska (eitt nú bóltar, høll, saft o.l. BSF hevur kappingarleiðsluna um hendi).
- Kappingarnevndin sendir feløgunum kappingarætlan áðrenn kappingin byrjar.
- BSF útvegar heiðursmerki til nr. 1,2 og 3 í hvørjum bólki.

**Kappingarnevndin BSF 2019**